Áðrenn Monako:

# Nógv meira enn rasarakoyring

**Formel 1 koyringin í Monako er tann mest víðagitna koyringin á kappingarárinum, men hon er eisini nógv meiri enn ein kappkoyring. Hetta er savningardepilin fyri kend og rík fólk úr øllum heiminum. Monako Grand Prix er stutt sagt eitt marglætisparadís**

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Senna vann koyringina í Monako seks ferðir, og hetta hevur eingin gjørt honum eftir. Men hann var ikki júst koyrarin, sum Rainier fúrsti helst av øllum vildi geva steypið*

Tað er í Monako, at liðini bjóða sínum hvøvuðsstuðlum á vitjan, og tað er í Monako, at høvuðsstuðlarnir bjóða øllum teimum ríku og kendu á vitjan. Formel 1 koyringin var eitt av hæddarpunktunum á árinum hjá Rainier fúrsta, sum plagdi at handa steypið til vinnaran. Hann segði í eini samrøðu fyri nøkrum árum síðan, at mest vinnandi koyrarin í Monako, Ayrton Senna, var eisini tann mest ófólkaligi koyrarin, sum hann hevði hitt.

Hann passaði ongantíð ordiliga inn í snobbuttu døgurðahaldini aftan á koyringina. Hann plagdi at koma til døgurðan við konufólki av ivasomum uppruna. Hetta fall ikki í góða jørð hjá prinsinum.

Senna vann koyringina í Monako seks ferðir. Men Monako var somuleiðis breytin, har Senna sló Eddie Irvine aftan á eina koyring, tí hann metti, at nýbyrjaði írin hevði koyrt vandamikið.

Í ár hevur Red Bull bjóða filmskaparanum Georg Lucas og hinum, sum spæla í Star Wars, á vitjan. So Red Bull koyrarin David Coulthard noyðist kanska at velja í millum tí ljósu- og myrku síðuna, áðrenn hann setur seg í bilin sunnudagin, fyri at jagstra sín triðja sigur í Monako.

# Trulli vann seinast

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Við góðum byrjunarstøðum higartil í ar, er Jarno Trulli helst eitt gott boð upp á ein vinnara sunnudagin*

Toyota koyrarin Jarno Trulli vann í Monako í fjør. Tá koyrdi hann í Renault. Hann varð stutt eftir koyrdur av Renault liðnum, tí hann klandraðist við stjóran Flavio Briatore. Nú koyrir hann í Toyota. Bæði hann og liðið liggja nummar tvey í kappingini um meistaraheitið, og hann hevur havt góðar byrjunarstøður í ár. Tí er Trulli óivað eitt gott boð uppá ein vinnara sunnudagin.

Men tað eru Renault koyrararnir Fernando Alonso og Giancarlo Fissichella eisini. Renault bilurin hevur verið besti bilurin í ár, og byrjunarstøðurnar hava verið góðar. Fenando Alonso er sjálvandi besta boðið. Hann hevur vunnið tríggjar koyringar í ár og er á odda í kappingini um heimsmeistaraheitið.

Fissichella vísti tó í Spania, at hann klárar at avbjóða liðfelagnum, hann vann somuleiðis ársins fyrstu koyring, og eigur tí ikki at verða gloymdur.

Tað slepst heldur ikki uttanum finnan Kimi Räikkönen. Hann vann sera sannførandi í Spania, og megnar hann at fáa nokkso óstøðuga McLaeren bilin um málstrikuna, kann tað saktans verða, at hann er fyrstur um hana.

# Hagtølini

| | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | 95 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B36-Skála | - | 2-0 | 2-1 | 6-0 | - | - | - | - | - | - | - | 3-0-0 | 10-1 |
| VB-GÍ | 0-1 | 2-4 | 0-3 | 1-2 | 1-2 | 3-3 | 1-3 | 3-1 | 0-0 | 0-4 | 0-2 | 2-1-8 | 10-25 |
| ÍF-EB/S | - | 1-1 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-1-0 | 1-1 |
| KÍ-TB | - | - | - | 7-0 | - | - | - | 10-0 | - | 5-2 | 2-2 | 3-1-0 | 24-4 |
| HB-NSÍ | 2-1 | 1-0 | 1-0 | 4-0 | 0-0 | 2-5 | 1-3 | 2-1 | 2-2 | — | 0-0 | 5-3-2 | 15-12 |

Bæði KÍ og GÍ kunnu helst finna eina góða vón um stig hetta umfarið, um skeitt veður at hagtølunum. Í øllum førum hevur TB havt tað sera trupult í Klaksvík, har teir eisini havt lagt rygg til fleiri stórtap, tá teir hava verið í bestu deildini seinnu árini.

Somuleiðis hava gøtumenn staðið seg sera væl í Vági, har teir fimm ferðir á rað hava fingið fult. Hagfrøði, sum onnur feløg í landinum helst bara kunnu droyma um.

B36 og HB tykjast eisini hava hagtølini í sínum parti, tá tosað verður um oddauppgerðirnar, sum verða á skránni sunnu- og leygardagin, meðan talan hinvegin er um javnleik í einastu uppgerðini, sum ÍF og EB/Streymur hava spælt í Fuglafirði síðani 1995.

Talvan sýnir, hvussu tað hevur tørnað út, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava tikist í tilsvarandi dystunum seinastu tíggju árini.

-jm

## formuladeildin

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 9 | 5 - 3 - 1 | 12 | 3 | 9 | 18 |
| 2 HB | 9 | 5 - 1 - 3 | 24 | 12 | 12 | 16 |
| 3 NSÍ | 9 | 4 - 4 - 1 | 15 | 9 | 6 | 16 |
| 4 Skála | 9 | 4 - 3 - 2 | 18 | 12 | 6 | 15 |
| 5 TB | 9 | 3 - 3 - 3 | 10 | 10 | 0 | 12 |
| 6 ÍF | 9 | 3 - 3 - 3 | 12 | 20 | -8 | 12 |
| 7 KÍ | 9 | 3 - 2 - 4 | 13 | 13 | 0 | 11 |
| 8 EB/Streymur | 9 | 2 - 4 - 3 | 8 | 14 | -6 | 10 |
| 9 VB | 9 | 2 - 2 - 5 | 5 | 13 | -8 | 8 |
| 10 GÍ | 9 | 1 - 1 - 7 | 9 | 20 | -11 | 4 |

**2. deild menn**

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B68 | 3 | 3 - 0 - 0 | 12 | 0 | 12 | 9 |
| 2 HB | 3 | 2 - 0 - 1 | 12 | 6 | 6 | 6 |
| 3 B71 | 3 | 2 - 0 - 1 | 9 | 4 | 5 | 6 |
| 4 FSV04 | 3 | 2 - 0 - 1 | 4 | 1 | 3 | 6 |
| 5 Royn | 3 | 2 - 0 - 1 | 3 | 9 | -6 | 6 |
| 6 AB | 3 | 1 - 1 - 1 | 5 | 5 | 0 | 4 |
| 7 Sumba | 3 | 1 - 0 - 2 | 13 | 15 | -2 | 3 |
| 8 LÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 8 | 11 | -3 | 3 |
| 9 B36 | 3 | 0 - 1 - 2 | 4 | 6 | -2 | 1 |
| 10 GÍ | 3 | 0 - 0 - 3 | 5 | 18 | -13 | 0 |

**1. deild kvinnur**

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 KÍ | 5 | 5 - 0 - 0 | 26 | 5 | 21 | 15 |
| 2 B36 | 5 | 4 - 0 - 1 | 18 | 5 | 13 | 12 |
| 3 GÍ | 5 | 3 - 0 - 2 | 8 | 9 | -1 | 9 |
| 4 AB | 5 | 1 - 1 - 3 | 3 | 14 | -11 | 4 |
| 5 EB/Streymur | 5 | 1 - 0 - 4 | 10 | 14 | -4 | 3 |
| 6 FSV04 | 5 | 0 - 1 - 4 | 2 | 20 | -18 | 1 |

**Danska superligan**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brøndby (S) | 28 | 16- 8 - 4 | 43 | 19 | 24 | 56 |
| 2 FCK (M) | 28 | 14- 7 - 7 | 49 | 36 | 13 | 49 |
| 3 AaB | 28 | 14- 6 - 8 | 52 | 35 | 17 | 48 |
| 4 FCM | 28 | 14- 5 - 9 | 40 | 36 | 4 | 47 |
| 5 Esbjerg | 28 | 12- 8 - 8 | 56 | 38 | 18 | 44 |
| 6 OB | 28 | 10- 9 - 9 | 49 | 33 | 16 | 39 |
| 7 Viborg | 28 | 10- 9 - 9 | 34 | 37 | -3 | 39 |
| 8 AGF | 28 | 11- 5 -12 | 43 | 43 | 0 | 38 |
| 9 Silkeborg | 28 | 10- 6 -12 | 41 | 46 | -5 | 36 |
| 10 Randers FC | 28 | 5 - 8 -15 | 27 | 54 | -27 | 23 |
| 11 Herfølge | 28 | 6 - 5 -17 | 24 | 57 | -33 | 23 |
| 12 FC Nordsj. | 28 | 5 - 6 -17 | 28 | 52 | -24 | 21 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

## Støður, Formel 1

| Koyrarar: Navn | Land | Merki | Stig |
|---|---|---|---|
| Fernando Alonso | Spania | Renault | 44 |
| Jarno Trulli | Italia | Toyota | 26 |
| Kimi Raikkonen | Finnland | McLaren | 17 |
| Giancarlo Fisichella | Italia | Renault | 14 |
| Ralf Schumacher | Týskland | Toyota | 14 |
| Mark Webber | Australia | BMW-Williams | 12 |
| Michael Schumacher | Týskland | Ferrari | 10 |
| Juan Pablo Montoya | Kolumbia | McLaren-Mercedes | 10 |
| David Coulthard | Stórabretland | Red Bull | 10 |
| Nick Heidfeld | Týskland | BMW-Williams | 9 |
| Rubens Barrichello | Brasil | Ferrari | 8 |
| Alexander Wurz | Eysturríki | McLaren-Mercedes | 6 |
| Jacques Villeneuve | Kanada | Sauber-Petronas | 5 |
| Pedro de la Rosa | Spania | McLaren | 4 |
| Christian Klein | Eysturríki | Red Bull | 3 |
| Felipe Massa | Brasil | Sauber-Petronas | 2 |
| Vitantonia Liuzzi | Italia | Red Bull | 1 |

**Bilar**

| Merki | stig |
|---|---|
| Renault | 58 |
| Toyota | 40 |
| McLaren | 37 |
| BMW-Williams | 21 |
| Ferrari | 18 |
| Red Bull | 14 |
| Sauber-Petronas | 7 |